

# Rúsdrekkasølan skal lyftast upp á eitt hægri tænastustøði

## Søkt verður eftir varaleiðara til handilin í Tórshavn

Í handlinum í Havn starvast millum 11 og 17 fólk (søla og goymsla), og árliga sølan er um 50 mió. krónur. Handilin í Havn stendur fyri sløkum helminginum av samlaðu søluni hjá Rúsdrekkasøluni og er ein týðandi partur av virkseminum hjá Rúsdrekkasøluni.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur sett sær fyri at menna tænastuveitingarnar. Tann, ið settur verður, skal virka fyri hesari menning innan sítt starvsøki og saman við leiðaranum standa fyri leiðsluni av handlinum í Havn. Starvið fevnir m.a. um kundatænastu, ráðgeving um vørur, sølu, starvsfólkaleiðslu og -menning.

Ein týðandi uppgáva verður at standa fyri dagligu starvsfólkamenningini, so at starvsfólkini fáa holla vitan um vørurnar hjá Rúsdrekkasøluni og kunnu ráðgeva kundunum í hesum sambandi. Arbeiðið fevnir eisini um tvørgangandi arbeiðsuppgávur, ad hoc uppgávur, íverksetan og verkætlanarleiðslu.

Arbeiðsuppgávan er breið og fjølbroytt, og tí er neyðugt við góðari og miðvísari stýring.

Varaleiðarin í handlinum vísir til handilsleiðaran.

**Faklig førleikakrøv og royndir**
Hægri- ella millumlong útbúgving innan handilsliga økið (ella annar javngóður førleiki saman við viðkomandi kunnleika til okkara vøruøki).

Tað er ein fyrimunur at hava viðkomandi leiðsluroyndir og harumframt kunnleika og royndir viðvíkjandi:

- Holla vøruvitan
- Hvussu vørur okkara hóska saman við ymsum mati
- Service Management
- Business Development/ virkismenning
- Broytingar- og starvsfólkaleiðslu

**Persónligur profilur**
- Menningarsøkin
- Góð tænastuevni
- Skipað arbeiðslag
- Góð leiðslu-, samskiftis- og samstarvsevni
- Dugnaligur sparringspartnari

**Setanartreytir**
Setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Rúsdrekkasølu Landsins í hendi í seinasta lagi 19. februar 2010 kl. 12. Umsóknin skal sendast til Rúsdrekkasølu Landsins, att.: Elsa Maria Holm Olsen, Yviri við Strond 15, postboks 3069, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú vita meira um starvið, vinaliga set teg í samband við Guðrið Ellefsen, sølu- og tænastuleiðara, ella Elsu Mariu Holm Olsen, stjóra.

sansir.fo

www.rusan.fo

RÚSDREKKASØLA LANDSINS



vindeygu hurðar klædningur ... www.import.fo

## Nøgd, snið og stødd eftir tygara ynski, einki standard



# Vindeygu úr kjarnutræ
– træ fyri lívið!

Vit hava nokk øll undrast yvir t.d. teir gomlu bygningarnar úti í Tinganesi, og tær gomlu træ kirkjurnar. Nógvir av hesum bygningunum eru fleiri hundrað ára gamlir. Viðurin stendur ár eftir ár, uttan at tíðin setir síni spor. Einki rot, tí tað høga kjarnuinnihaldið í viðinum forðar fyri, at tílíkt kann grógva í viðinum. Her er talan um kjarnutræ!

Framleiðarar av vindeygum við 90-100% kjarnutræi eru skrásettir undir »2 øko-ordningen« hjá Dansk Vindue Certificering (DVC). Strangasta góðkenning í vindeygavinnuni.

»Øko« er stytting fyri økologisk, tí hesin viður nýtist ikki aðra viðgerð sum t.d. impregnering. Viðurin er 100% gjøgnum viðgjørdur frá náttúruni.

**Træ vindeyguni og hurðarnar hjá Sp/f Import.fo hava øll:**
• Minst 95 % kjarnutræ innan og 100 % uttan. • Framleiðara ið er skrásettur undir 2 øko-ordningen hjá Dansk Vindue Certificering (DVC). • Spegilsskorið og límað kjarnutræ. • ISO 9001 góðkenda framleiðslu. • Bakfestar glaslistar og síðani fugað við hond, innan og uttan. T.v.s. ongir sjónligir seymir, ið kunnu rusta.




Import v/Toni Dam
Postboks 3070
Skótarók 3
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 321 521
Fax +298 321 421
import@import.fo

Opið er:
mán - frí kl. 08.00 - 16.30
Annars eftir avtalu

import.fo

Sosialurin 341800